# Ársfrágreiðing

# 2020

NORĐOYATUNNILIN

**Aðalfundur 20. mai 2021**

# Frágreiðing
# til aðalfundin 20. mai 2021

**(fyri árið 2020)**

## 1. Nevndin og felagið

Á seinasta aðalfundi, 24. apríl 2020, vóru nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndina vóru afturvald: Jens Kári Vilhelm, Johanna á Bergi og Heri M. Hammer. Nevndin skipaði seg við Jens Kára Vilhelm sum formanni og Hera Hammer sum næstformanni.

Felagið hevur skrivstovu í leigaðum hølum á Heiðavegi 57, Saltangará.

Raksturin er skipaður í samstarvi við Eysturoyartunnilin, P/F Vágatunnilin og P/F Tunnil, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við P/F Tunnil. Tekniski leiðarin, sum eins og onnur starvsfólk, er settur í starv hjá P/F Tunnil, hevur yvirorðnaðu ábyrgdina av rakstrinum í Vágatunlinum, Norðoyatunlinum og Eysturoyartunlinum. Tekniski raksturin er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2020 16,1 mió. kr., 1,6 mió. kr. minni enn í 2019. Av rakstrinum fóru m.a. 4,9 mió. kr. til rakstur av tunli og vegum, 3,1 mió. kr. til fyrisiting., 1,8 mió. kr. til el, 0,3 mió til tryggingar, 5,3 mió. kr. til avskrivingar, 0,2 mió. kr. til rentur og forútgoldin skattur 0,4 mió. kr.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 1,9 mió. kr., sum er 1,2 mió. kr. lakari enn árið fyri.

## 1.2 Korona – Covid 19

Korona hevur sum hjá mongum øðrum havt sína neiligu ávirkan á úrslitið hjá felagnum. Tá almennu boðini komu á Grækarismessu, at landið meir ella minni stongdi, sást tað í somu løtu á ferðsluni. Í mars 2020 fall ferðslan við 21,2 % í mun til árið fyri og apríl 23,6% minni. Longu í mai rættaði ferðslan seg aftur tá tað vóru 5,6% akfør færri í mun til 2019. Restina av árinum er ferðslan hækkað í mun til 2019 t.v.s.ein hækking hvønn mána á 2% til 6% um mánaðin. Undantakið er august, har ferðslan var 16,7% lakari enn august 2019. Hetta er uttan iva orsaka av at tey vanligu stóru tiltøkini í Klaksvík vóru tikin av skrá, her verður hugsað um Summarfestivalurin og sjómannadagar.

Íalt koyrdu 1.284.544 akfør í Norðoyatunlinum í 2020 í mun til 1.308.519 í 2019, t.v.s. 1,8% færri akfør.

# 2. Virksemið

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum  fyri felagið og løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð, at útvega fast samband millum Eysturoy og Norðoyggjar, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í §1 í  løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð stendur:

Rættur til tunnilsgerð og eftirlit

§ 1. P/F Norðoyatunnilin, stovnað við heimild í løgtingslóg nr. 168 frá 21. desember 2001 um stovnan av partafelagi at gera fast samband um Leirvíksfjørð, fær rætt til vega- og tunnilsgerð millum Eysturoy og Borðoy og ognarrætt til lidna tunnilin við tilhoyrandi vegi.

*Stk. 2.* Landsverkfrøðingsstovnurin skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum góðkenna tunnilsverkætlanina, herundir vega- og tunnilsgerðina, áðrenn tunnilsarbeiðið verður sett í verk, og skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanin verður framd samsvarandi góðkendu ætlanini. Tá neyðugar forkanningar og prosjektering eru gjørdar og í seinasta lagi  4. apríl 2006, skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingslóg um ein tunnil undir ella eina vegføring fram við Leirvík.

*Stk. 3.* Tá útveganarkostnaðurin er fult afturgoldin, og P/F Norðoyatunnilin stendur sum eigari, verður alt anleggið uttan viðurlag avhendað landinum til ognar.

Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymiskar tænastur, t.d. viðv. pumpuskipanini, gjaldsstøðini, reingerð av tunlinum, dagligum eftirliti í tunlinum v.m. Vit hava onga fasta avtalu um viðlíkahald av el-innstallatiónunum, men alt arbeiðið verður gjørt eftir áheitan frá tunnilsfelagnum. Hetta viðførir, at alt dagligt eftirlit av el-installatiónunum verður framt av tunnilsfelagnum.

Pumpuverkið í Norðoyatunlinum hevur koyrt gott. Regluligt viðlíkahald verður gjørt á pumpurnar. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, er støðug, tó er tað eitt sindur skiftandi í mun til árstíðina. Nøgdin liggur millum 1250 og 1450 tons um samdøgrið.

Felagið hevur í longri tíð umhugsað og kannað møguleikarnar at dagføra tunnilin, og tá so SEV spurdi okkum um møguleikan at leggja tveir 60 kV og tveir 20 kV kaðlar gjøgnum tunnilin, bleiv avgjørt at gera eina størri dagføring av tunlinum. Við hesi avtalu við SEV, komu teir at gjalda ein part av arbeiðnum. Dagføringin av tunlinum byrjaði í oktober 2020 og var liðug ultimo januar 2021. Síðani er tunnilin eisini asfalteraður.

Í høvuðsheitinum umfataði dagføringin hesi arbeiði:

- Stoyping av vegøksl og føringskanti í báðum síðum gjøgnum allan tunnilin. Samlaðu útreiðslurnar vóru 18,8 mió. kr. u/mvg. Sjálvt stoypiarbeiðið kostaði 17,3 mió. kr. u/mvg.

Av samlaðu útreiðslunum er parturin hjá SEV 8,2 mió. kr.
- Montering av markeringsljósum pr. 25 m á nýggju kantsteinarnar. Samlaðu útreiðslurnar vóru 2,8 mió. kr. u/mvg. Útreiðslurnar til tilfar og montering av ljósunum var 2,6 mió. kr. u/mvg.
- Eyka vatntrygging móti lekum niður á vegbreytina. Samlaðu útreiðslurnar vóru uml. 7,5 mió. kr. u/mvg.
- Asfaltering av øllum tunlinum. Kostnaður 8,8 mió. kr. u/mvg.
- Nýggja pumpustøð við teknikhús EH5, sum er mitt ímillum portalin í Klaksvík og pumpustøðina á botni. Hendan pumpustøðin skal pumpa alt vatnið út, sum kemur á strekkinum frá portalinum í Klaksvík og niður til teknikhús EH5, í staðin fyri at vatnið rennur niður á botn. Hetta arbeiðið er í gongd, og nýggja pumpustøðin verður væntandi tikin í brúk fyrst í juni 2021. Nýggja pumpustøðin væntast at pumpa uml. 900 $m^3$ av vatni um samdøgrið.

Ætlanin var, at Rambøll Sverige skuldi kanna loft og veggir fyri leyst grót á vári 2020, men vegna korona bleiv hetta útsett, og nýtt tíðspunkt er ikki avtalað enn..

Nakað av arbeiði hevur verið í sambandi við ymiskar trupulleikar við teimum teknisku stýringunum í tunlinum av tí, at el-komponentarnir, sum hoyra til stýringarnar, eldast og mugu skiftast. Hetta verður gjørt sum vanligur rakstur av tunlinum.

Frá statusdegnum til í dag eru partar av omanfyrinevndu ábótum gjørdar í 2021. Stórur partur er liðugur í 2020. Tær ábøtur sum eru gjørdar í 2021 eru ikki við í ársroknskapinum fyri 2020.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitti uppruna fígging til gerð av tunlinum. Lánisáttmálin sum upprunaliga varð gjørdur við Íleggingargrunnin í 2006, tá tunnilin lat upp fyri almennari ferðslu, skuldi verða afturgoldin tá 14 ár vóru farin, t.v.s. 2020. Felagið hevur havt eitt somikið gott gjaldføri, at saldoin á láninum til Íleggingargrunnin við var afturgoldin fyri tíð. Felagið hevur uppfyllt lánitreytirnar, og hevur onga lániavtalu.

## 2.3 Ferðsla.

Í dag eru seks av oyggjunum knýttar saman við byrgingum, brúgv og undirsjóvartunlum.Sambært hagtølum frá Hagstovuni, búðu á hesum oyggjum í januar 2021  46.591 íbúgvar. Samlaða fólkatalið var 52.967. Sostatt eru 88% av íbúgvunum í Føroyum samanbundnir við vegsambandi.

Í talvuni niðanfyri hava vit eisini nevnt ferðafólkatalið, sum fór um flogvøllin. Hesi hava stóran týdning fyri ferðsluna í Vágatunlinum. Ferðslan um flogvøllin er nógv merkt av Covid 19, sum í 2020 hevur merkt flogvinnuna í stóran mun. Ferðafólkatalið um flogvøllin fór úr 424.281 ferðafólk í 2019 til 179.778 í 2020, ein minking á 57,6%.

NORÐOYATUNNILIN



Mynd 1

Samanbindur 88,0% av íbúgvunum

Fólkatal[1]:

| | |
|---|---|
| Streymoy | 25.119 (47,4%) |
| Eysturoy | 11.979 (22,6%) |
| Vágar | 3.344 ( 6,3%) |
| Norðoyggjar | 6.149 (11,6%) |
| Í alt | 46.591 (88,0%) |
| Aðrar oyggjar | 6.376 (12%) |
| Íalt (2020) | 52.124 |
| | |
| Flogvøllurin 2020[2] | 179.778 |

[1]Hagstovan
[2]FAE.fo

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið, og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar frá 2015 til 2020. Fýra teir fyrstu mánaðirnir í 2021 eru eisini við á myndini.




| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2015 | 1.846 | 2.171 | 2.422 | 2.355 | 2.609 | 2.664 | 2.509 | 3.011 | 2.626 | 2.488 | 2.420 | 2.440 |
| 2018 | 2.852 | 3.054 | 3.139 | 3.275 | 3.496 | 3.532 | 3.235 | 4.001 | 3.504 | 3.314 | 3.433 | 3.189 |
| 2019 | 3.024 | 3.272 | 3.423 | 3.545 | 3.755 | 3.837 | 3.620 | 4.254 | 3.700 | 3.703 | 3.519 | 3.344 |
| 2020 | 3.159 | 3.508 | 2.699 | 2.709 | 3.545 | 3.929 | 3.773 | 3.545 | 3.944 | 3.861 | 3.750 | 3.705 |
| 2021 | 3.498 | 3.752 | 4.179 | 3.706 | | | | | | | | |

Mynd 2. Miðalferðsla pr. dag frá 2015 til 2020. Miðaltølini fyri januar, februar, mars og apríl 2021 eru eisini víst í talvuni.




Ferðslan hevur í 2020 verið í miðal 3.510 pr. døgn, í mun til 3.585 akfør/døgn í 2019.

Samlaða ferðslan og prosentvísa broytingin síðan tunnilin opnaði, sæst niðanfyri:

| Ár | Akfør | % broyting |
|---|---|---|
| 2006 | 448.884 | |
| 2007 | 662.828 | 47,7% |
| 2008 | 694.398 | 4,8% |
| 2009 | 698.460 | 0,6% |
| 2010 | 707.402 | 1,3% |
| 2011 | 727.316 | 2,8% |
| 2012 | 747.368 | 2,8% |
| 2013 | 791.604 | 5,9% |
| 2014 | 843.645 | 6,6% |
| 2015 | 899.800 | 6,6% |
| 2016 | 1.000.632 | 11,2% |
| 2017 | 1.138.369 | 13,8% |
| 2018 | 1.217.826 | 6,8% |
| 2019 | 1.308.519 | 6,4% |
| 2020 | 1.284.544 | -1,8% |

Mynd 3: Árlig ferðsla og %-broyting í mun til árið fyri. Tunnilin lat upp 29. apríl 2006, tí so stórur vøkstur frá 2006 til 2007.




Mynd 4. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin frá 2006 til 2020.

Tað skal viðmerkjast, at ferðslutølini fyri 2006 eru frá 29. apríl 2006, tá tunnilin opnaði. Sostatt eru 8 mánaðir taldir við í 2006. Tvey tey seinastu árini áðrenn tunnilin lat upp, vórðu um 110.000 akfør flutt um Leirvíksfjørð við ferju árliga.

## 2.4 Nýtslugjald og gjaldstøð

Nýtslugjøldini eru støðugt lækkaði síðan tunnilin varð tikin í nýtslu apríl 2006. Prísurin fyri persónbilar eru lækkaðir við millum 41% og 76%. Prísurin fyri staka koyring í apríl 2006, tá tunnilin lat upp var kr. Kr. 170,-. Í dag er prísurin kr. 100,-. Prísgongdin, síðan tunnilin varð tikin í nýtslu, sæst á myndunum niðanfyri.




Mynd 5. Prísgongdin fyri persónbilar síðan tunnilin lat upp í 2006. Stakprísur lækkaður 41%, hald (20 túrar) lækkað 76,5%.




Mynd 7. Prísur fyri hald til lastvognar, trailarar og bussar síðan tunnilin lat upp. Prísur yvir 12m lækkaður 83%, >6m <12m lækkaður 75%.




Mynd 8 Prísgongdin stakar túrar fyri lastvognar, trailarar og bussar síðan tunnilin lat upp. Stakprísur trailarar lækkaður 70% og >6m <12m lækkaður 55%




Mynd 9 Miðalgjald  pr. akfar í frá 2006 til 2020.

Miðalprísurin, sum hvørt akfar hevur goldið, er broyttur úr kr. 89,60 í 2006 niður í kr. 24,70 í 2020. Miðalprísurin í 2020 svarar til at hvørt akfar skal gjalda kr. 12,35 hvønn vegin.

Á næstu mynd er víst indeks fyri ferðsluna frá 2007, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2007 er sett til 100). Ferðslan fyri 2006 er ikki við, tá tunnilin fyrst lat upp í apríl.




Mynd 10. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu frá 2007 til 2020

Gongdin vísir at samlaða ferðslan er nakað størri í mun til árið fyri, og at tey, ið gera nýtslu av tunlinum, gjalda eitt sindur minni fyri hvønn túrin. Meðan prísurin er lækkaður 70% er ferðslan økt við 94%.

## 2.5 Gjaldskipan

**Felags innkrevjingarfelag fyri allar gjaldstunlarnar**

P/F Vágatunnilin (VT) og P/F Norðoyatunnilin (NT) hava síðan tunlarnir lótu upp fyri ferðslu, í ávikavist 2002 og 2006, havt samstarv við norska felagið Q-free um at krevja pening inn frá teimum, sum nýta tunlarnar.

Nú P/F Eysturoyartunnilin er gjaldstunnil og seinni Sandoyartunnilin eisini gerst gjaldstunnil, hevur Í longri tíð verið arbeitt við eini nýggjari KT innkrevjingarskipan, sum allir fýra tunlarnir eru felags um. Feløgini hava gjørt avtalu við P/F Formula, sum hevur ment eina føroyska skipan. Høvuðsatliti við skipanini er, at gera umsitingina av innkrevjingina bíliga, effektiva og kundavinarliga. Við hesi skipan er mett, at verandi umsiting við lítlari tillaging, kann krevja inn vegna VT, NT, EST og ST, umframt at umsita raksturin av tunlunum.

Øll innkrevjing er løgd í eitt felag P/F Tunnil, sum varð stovnað í 2019. Felagið varð stovnað av teimum trimum feløgunum P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar, sum eigarar við hvør sínum triðingi við einum partapeningi á kr. 510.000.

Fyrimunirnir við at hava eitt felag, at venda sær til eru m.a.

- Kundin tørvar ikki at hugsa um, hvar gjaldið fyri koyring skal rindast
- Kundin hevur eitt stað at gjalda
- Kundin skal ikki hugsa um, hvørt tunnilsfelag skal gjaldast til
- Kundin kann framvegis hava **eitt** hald til allar tunlarnar
- Umsitingarligar sparingar
    - Útreiðslur fyri umsiting av innkrevjing verður býtt millum feløgini í mun til ferðsluna í hvørjum tunli
    - Somu starvsfólk sum vóru frammanundan, taka sær av kundum og gjøldum
    - Sleppast kann undan dupultfunktiónum
    - Kostnaður av menning av skipanum er býtt millum tunnilsfeløgini
- Hvørt tunnilsfelag er framvegis ein sjálvstøðug inntøku-, kostnaðar- og íløgueind og beinleiðis kostnaðir v.v. einum tunli, verður goldið at tí tunlinum, sum kostnaðurin viðvíkur.

**Stutt um mannagongdina tá koyrt verður.**
Tá talan er um hald, teknar kundin eitt hald hjá P/F Tunnil, sum er galdandi fyri VT, NT, ET og ST. Inngjøldini verða goldin til P/F Tunnil, og so hvørt sum koyrt verður, avroknar P/F Tunnil, til tann tunnilin har koyrt er.

Stakir túrar (túrar, tá ein ikki hevur hald), verða kravdir inn av P/F Tunnil og avroknaðir til rætta tunnilin.

Greiður fíggjarligur skilnaður skilnaður er millum tunlarnar. Felagsútreiðslurnar fyri at krevja inn, verða deildar millum feløgini í mun til ferðsluna í teimum einstøku tunlunum.

Tá vit hava arbeitt við hesum og kannað hvussu innkrevjingin kann gerast so brúkaravinarlig og bílig sum møguligt, hava vit hugt eftir, hvussu hetta er gjørt í øðrum londum serstakliga í Danmark, Norra o.a.

Taka vit fyrst partin har myndatøkan av nummarplátuni fer fram, eru vit í Føroyum langt frammanfyri hini londini. Aðrastaðni nýta tey framvegis sokallaðu kubbarnar (brobizz í DK og brikke í NO). Hesar strikaðu vit fyri uml. 5 árum síðan og ikki fyrrenn seinasta ár setti Danmark royndarskipan uttan kubbar í verk. Í Norra brúka tey framvegis kubbar, tó við royndarverkætlanum uttan kubbar.

Viðvíkjandi innkrevjingarpartinum hevur Norra broytt sín hátt at krevja inn. Fyri 3-4 árum síðani, vóru áleið 50-60 feløg, sum kravdu inn fyri áleið 160 bummstøðir. Hetta er nú broytt til 5 feløg. Sjálvsagt var nógv umsiting at hava 50-60 feløg. Tey 5, sum nú eru eftir, avroknað so sínámillum. Viðmerkjast skal, at allir tunlar, vegir o.s.fr. sum liggja í sjálvstøðugum feløgum, hava lániskuld sum landið veðheldur fyri.

Í Danmark hava tey nógv sjálvstøðug feløg, sum reka ymsar partar av infrakervinum. Her kunnu nevnast Stórabeltsbrúgvin, Oyrasundsbrúgvin, Prinsesse Mary's bro, nógvar ferjur, parkering o.s.fr. Her hava teir valt sama leist, sum vit hugsa um. Teir hava stovnað eitt innkrevjingarfelag A/S Brobizz. Kundar teknað eitt hald, sum kann brúkast við allar innkrevjingarstøðirnar. Avroknað verður til feløgini, sum brúkarin hevur gjørt nýtslu av.

## 2.6 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri

at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er, at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast verða ein liður í hjálpararbeiðinum, um óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Stórar venjingar eru 5. hvørt ár seinast í 2013. Smærri venjingar, skipaðar av lokalu brandmyndugleikunum, hava verið í tunlinum í 2019.

Orsaka av Korona hevur eingin størri venjing veri.

## 2.7 Frí ferðsla

Eins og undanfarin ár vóru ársdagarnir, tá ið ávikavist Vágatunnilin og Norðoyatunnilin lótu upp fyri ferðslu, hátíðarhildnir við at opið varð uttan at nýtslugjald var kravt. Umframt hetta vóru 2 dagar lagdir í samráð við handilsfelagið í Klaksvík, sum á henda hátt kann nýta høvi at gera vart við seg.

Íalt koyrdu 16.364 teir 4 dagarnar frítt var at koyra í 2020. Tunnilsdagarnir eru vorðnir eitt hugtak og tær afturmeldingar vit fáa eru, at vinnan og áhugabólkar í Norðoyggjum eru væl nøgd við hesar møguleikar, og verður nakað meira gjørt burturúr at skipað fyri serligum tiltøkum, so sum tilboð frá handilslívinum.

## 2.8 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastuavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

7

# 3. Mál av samfelagsligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

NORÐOYATUNNILIN

# 4. Rakstrarætlan fyri 2021

Høvuðstølini í rakstrarætlanini fyri 2021 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 17,6 |
| Kapacitetskostnaður | -6,1 |
| Rakstur og fyrisiting | -2,5 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 9,0 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -5,4 |
| Fíggjarpostar | 0,1 |
| **Ársúrslit** | 3,5 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 5,4 |
| Asfaltering | -32,7 |
| **Likviditetsavlop** | -27,3 |

Støðisognin er við árslok uml. 275,7 mió. kr.. Ávísar íløgur skulu væntast í 2020.

Tórshavn 18. mai 2021

Jens Kári Vilhelm,formaður

Heri M. Hammer, næstformaður

Jóhanna á Bergi, nevndarlimur

/ Uni Danielsen, stjóri

NORÐOYATUNNILIN

